# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



30. september fekk Mildrið Birita, ið er 6 ár eina lítlasystir, sum var 52 cm. long og vigaði 3500 gr. Foreldur teirra eru Estrid Johanesen og John Nielsen í Klaksvík

23. august fingu Jana Mari Olsen, Vágur og Ragnar Hansen, Strendur, ein son. Hann var 37 cm. langur og vigaði 850 gr.

29. august fingu Marjun W. og Poul Christoffur Thomassen, eina dóttur á Gentofte Hospital. Hon var 52 cm. long og vigaði 3700 gr., hon eitur Birita.

22. september fingu Anna Maria og Egil G. Olsen, Runavík, eina dóttur. Hon var 43 cm. long og vigaði 1840 gr.

29. september fingu Katrin og Jóhannis Lydersen, Frederikshavn, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 3980 gr.

6. oktober fingu Kjarta Johannesen og Erland E. Jacobsen, Argir, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3700 gr.

7. oktober fingu Jóhanna P. við Streym og Jóhan H. S. Mouritsen, Norðskáli, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4150 gr.

8. oktober fingu Naja Ellingsgaard og Magni Mohr, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3050 gr.

8. oktober fingu Heidi og Jan Heinesen, Norðragøta, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3460 gr.

8. oktober fingu Andrea og John Arnfinn Reynstind, Sørvágur, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4600 gr.

8. oktober fingu Marta Johannesen og Rasmus Larsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3255 gr.

9. oktober fingu Nathalia og Richard Rognsoy, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 3975 gr.

9. oktober fingu Elisabeth og Peter Gaardbo, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3140 gr.

9. oktober fingu Annika á Heygum og Heri Djurhuus Dahl, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3650 gr.

9. oktober fingu Jóhanna E. Heinesen og Karl Jákup Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2800 gr.

10. oktober fingu Christina og Jørgin Pauli Johannessen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 2475 gr.

10. oktober fingu Birita Petersen og John Heri Mouritsen, Sandavágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3400 gr.

10. oktober fingu Ann Julia Benjaminsen, Nes og Hans Anders Jacobsen, Strendur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3600 gr.

11. oktober fingu Eyð og Torfinn Viðoy, Viðareiði, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3950 gr.

11. oktober fingu Jakoba Jensen og Arthur Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3650 gr.

11. oktober fingu Maibritt Hansen og Kári Matthiasson, Langasandur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3600 gr.

## Brúdleyp

Í dag, 15. oktober kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Sunrid Olsen og Gunnleif Rasmussen, Skála.

Í dag, 15. oktober kl. 16.00 giftast í Sandavágs kirkju Rúna Marna Olsen, Sørvágur og Tony Lindal Davidsen, Sandavágur.

Í dag, 15. oktober kl. 16.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Leila Hentze Petersen og Jóhan Hansen, bæði úr Fuglafirði. Tey, ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið, eru vælkomin til ein drekkamunn heima hjá Dia Petersen á Kambsdali leygarkvøldið kl. 21.00.

## Prógv

24. september fekk Marjun Weihe Thomassen prógv sum Cand. Merc í Applied Economics and Finance á Copenhagen Businesschool.

29. september 2005 fingu Brindis R. og Cecil Weihe, Tórshavn hendan fitta drongin. Hann vigaði 3545gr. og var 52 cm langur



# Óluva Jensen 60 ár



Týsdagin 18. oktober verður Óluva Jensen í Skopun 60 ár. Óluva er fødd og uppvaksin í Skopun. Dóttir til Jacob Eli og Jóhannu Hansen. Hon er elst av 7 systkjum. Hini systkini eru Jancy, ið býr á Toftum, Elisabeth í Skálavík, Eisinberg í Skopun, Óla Christian á Toftum, Símin í Havn og Eyðvør í Húsavík.

Jóhanna og Jacob Eli búðu inni hjá Elisabeth, fosturmammu Jacob Eli, tey fyrstu árini. Tá Óluva var 8 ára gomul, fluttu foreldur og systkin niðan í »Garðar«, men Óluva bleiv eftir hjá ommuni.

Sjálvt um Óluva vaks upp hjá ommu, so var hon ein partur av systkinaflokkinum, tí systkini hava altíð verið sum eitt, sum man plagar at taka til, Óluva er góð við síni systkin og tey við hana.

Óluva hevur altíð verið røsk og ágrýtin, tá hon var byrjað uppá nakað so skuldi tað fullførast. Væl hava hendurnar sitið, tí røsk er hon til hendurnar, serliga hevur henni dámt væl at bundi, og ikki eru tað so fá pløgg, hon hevur lagt úr hondum.

Matgerðini liggur væl fyri hjá henni, og eru løturnar ikki so fáar í køkinum í Samljóð og aðrastaðni, bæði til gaman og álvara.

Hon vaks upp í einari tíð, tá kúgvin var í kjallaranum, hoyggjast skuldi og torv arbeiðast, og alt skuldi fáast heim, har lá hennara partur ikki eftir.

Óluva hevur arbeitt innan fyri heimarøktina í skjótt 30 ár, og hevur hon ofrað seg fyri tey, ið hava hjálp fyri neyðini, og hevur hon fingið nógvar vinir fyri lívið í sínum til tíðir strævna og krevjandi arbeiði, men tað hevur ikki tikið móti frá henni.

Óluva er gift við Peturi Jensen úr Skopun, og fingu tey 3 børn. Leinu sum tey mistu 10 ára gamla, Jacob Eli og Marjun. Trý eru ommubørnini blivin, Petur, Leina og lítla Birita, sum hava sítt stóra pláss í ommusa hjarta, ja hon gevur seg alla sum hon er fyri sína familju.

Óluva hevur sanniliga eisini áhuga fyri samfelagnum. Har hon er, har er hon heil. Óluva er javnaðarfólk, og hevur hon verið nevndarlimur og kassameistari í Sandoyar sýslu javnaðarfelag í mong Harrans ár. Somuleiðis hevur hon sitið í skúlastýrinum fyri Skopunar skúla og Sandoyar Miðskúla í fleiri ár.

Óluvu dámar ikki at blíva róst, men orðatakið sigur at »giv mig en blomst mens jeg lever, så øjet kan frydes derved«.

Óluva! tær verður ynskt hjartaliga tillukku við 60 ára føðingardegnum og alt tað besta framyvir.

Vit verða mong sum koma í Samljóð, at gleðast saman við tær og tínum týskvøldið.

# Eivin Dam 70 ár



Í morgin, sunnudagin 16. oktober, verður Eivin Dam í Havn 70 ár. Eivin var í mong ár ein av fremstu fótbóltsspælarunum í Føroyum.

Foreldrini vóru Anna og Erik Dam. Tey búðu í Sjúrðargøtu, og Eivin vaks tískil upp sum rabarba, sum tað plagdi at verða nevnt. Anna og Erik fingu níggju børn – William, Anna Poulina, Brynjolv, Frank, Helena, Tróndur, Una, Torbein og Eivin. Eitt av lyndiseyðkennunum hjá teimum hevur verið, at tey hava verið sera fryntlig og fyrikomandi, og hetta er ikki minst galdandi fyri 70 ára føðingardagsbarnið.

Trý teirra doyðu blaðung av sjúku. Helena í 1942 og William og Poulina í 1946. Hini búsettust øll í Havnini. Eftir á lívi eru Frank, Una og Eivin.

Eivin lærdi til elektrikara hjá Einari Mikkelsen. Eftir at hava arbeitt hjá Einari Mikkelsen, fór Eivin í starv hjá SEV, og har var hann, inntil hann í 2003 fór úr starvi.

Í 1950 fór Eivin at spæla á dreingjaliðnum hjá HB. Í 1952 var hann onkra ferðina á 1. liði, og frá 1953 og til 1968, tá ið hann gavst at spæla fótbólt, var hann á besta HB liðnum. Nógvu tey fyrru árini var Eivin sera málsøkin miðframherji, sum hevði framúr gott skot, og tey seinnu árini var hann miðverji. Ikki minst tá komu góðu evnini at lesa spælið honum og HB til góðar.

Eivin var fyrstu ferð á landsliðnum í 1955 - sama árið sum hann var við til at vinna fyrsta FM heitið yvirhøvur til HB - og hann spældi fimm landsdystir. Tveir vóru móti Íslandi B, og tríggir landsdystir vóru móti Hetlandi. Eivin skoraði fimm mál á landsliðnum. Tey gjørdi hann øll, tá ið Føroyar 20. august í 1961 í Gundadali vunnu 6-1 á Hetlandi.

Eivin hevði hegni til so mangan ítrótt, og hann royndi seg eisini í øðrum ítróttargreinum enn fótbólti. Hann róði kapp við bátum hjá Havnar Róðrarfelag, hann vardi í fleiri ár málið hjá Neistanum í hondbólti, og hann var eisini stinnur borðtennisspælari. Í 1961 vann hann saman við Birgiri Hansen FM í tvímansleiki. Teir umboðaðu borðtennisfelagið Roynd.

Eivin Dam er giftur Lilly, sum er ættað úr Nesinum í Vági. Tey bygdu á trøðni, sum pápin hevði í Marknagili, og har búgva tey framvegis. Lilly og Eivin eiga trý børn - Hans, Eilen og Einar. Eilen býr í Vági, og dreingirnir búgva í Havnini. Eivin eigur seks abbabørn - tvær gentur og fýra dreingir.

**Dagurin**

15. oktober. Heiðveig, deyð í 1243. Hon var greivadóttir úr Bayern og giftist hertoganum Heinriki 1 í Slesiu.

16. oktober. Gallus, deyður í 640. Írskur munkur, sum læt kleystrið St. Gallen við Bodenvatnið byggja. Doyði 95 ára gamal.

17. oktober. Florentinus, deyður umleið 1525. Biskupur í orange í Fraklandi; kendur úr søguni av fleiri kirkjufundum, har hann hevur verið við, men annars vit teir einki um hann at siga.

Mikkjal á Ryggi varð føddur hendan dagin í 1879.